## Svend Auken fer at hitta javnaðarfólk

VITJAN
*tíðindaskriv*

Sunnukvøldið 25. september kl. 19.30 skipa Javnaðarflokkurin og Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fyri einum hugnakvøldi saman við navnframa danska javnaðarpolitikaranum Svend Auken. Svend Auken fer at tosa um ymisk aktuel mál og aftaná verður kjak, sum vónandi verður bæði spennandi og kveikjandi.

Svend Auken hevur áður verið á fundum og stevnum hjá bæði Javnaðarflokkinum og Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, og hevur tað verið sera áhugavert at hoyrt tað, sum hann hevur borið fram.

Svend Auken er ein sera royndur politikari, og hevur hann havt mong ymisk álitisstørv í danska Javnaðarflokkinum. Svend Auken varð fyrstu ferð valdur á fólkating í 1971, og hevur hann havt sætið har síðani. Hann var formaður í Javnaðarflokkinum frá 1987 til 1992. Harumframt hevur hann verið ráðharri í arbeiðsmarknaðarmálum og orku- og umhvørvismálum. Somuleiðis hevur hann havt álitisstørv innan Javnaðarflokkin bæði í norðurlendskum, evropeiskum og altjóða høpi.

Hugnakvøldið verður í hølinum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9.



*Sunnukvøldið verður Svend Auken gestur á hugnakvøldi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag*

# Krambakvinna við trimum størvum

**Í einasta handlinum á Kalsoynni, Geilabúðini, stendur Hannebeth Garðalíð, sum umframt at vera krambakvinna, hevur tvey onnur størv**

*Katrina Eyðunsdóttir Hansen/*
*Elsa Maria H. Hansen/*
*Mariann Mikkjalsdóttir*



*Hannebeth Garðalíð, eigari av Geilabúðini*

*mynd: Jens Kr. Vang*

Tá vit týsmorgunin vóru á Kalsoynni, fóru vit ein túr niðan í handilin á Húsum, Geilabúðin. Hetta er einasti handil á Kalsoynni.

Inni har hittu vit Hannebeth Garðalíð, ið er eigari av búðini.

Vit fingu okkum eitt prát við hana, og hon greiddi frá, hvussu tað er at hava handil úti á oyggj.

– Onkran fyrrapart kunnu vera einans tríggir kundar, men so er fult av fólki aðrar dagar. Serliga týsdagar tá nýggja vøran kemur. Tað er sum øll mangla alt ísenn, sigur Hannebeth.

Handilin er sera hugnaligur, og har eru nógvar ymiskar vørur at fáa.

Hannebeth roynir sum frægast at hava tað, ið fólk spyrja eftir. Vøran verður innflutt aðrastaðni frá.

– Men, segði hon, ofta gongur long tíð áðrenn eg finni fram til, hvar eg kann bíleggja allar hesar vørurnar, ið fólk biðja meg um.

### Hjálp frá øðrum stóran týdning

Hannebeth selir allar tær mest neyðugu vørurnar. Eisini hevur hon ymsar gávulutir og annað at selja.

1. oktober hevur Hannebeth verið eigari av búðini í eitt ár. Tann konan ið fyrr var eigari av handlinum, Dora Joensen, ætlaði at gevast við honum. Men hetta helt Hannebeth vera spell, og ein stórur missur fyri oynna. Tískil valdi hon at taka sær av búðini hjá Doru, í fyrstu syftu í tvey ár.

Hannebeth hevur starvast fulla tíð í Tórshavn, men nú arbeiður hon bert 3/4 tíð. Umframt at hon seymar hjá manni sínum, ið starvast sum skómakari í Tórshavn.

Vit spurdu hana um hvussu hon megnar at hava trý størv í senn.

– Tað hevði ikki borið mær til at havt handilin uttan hjálp frá øðrum, t.v.s børnunum og mammuni, sum eru ófør at hjálpa til tá eg eri til arbeiðis í Havn, sigur Hannebeth

### Handilin stóran sosialan týdning

Ta løtuna vit vóru í handlinum vóru eisini fleiri kundar har. Ein av teimum, Joan í Lon var farin at keypa inn til døgurða. Dagsins rættur heima við hús var flak. Eisini fekk lítla dóttirin Olivia eina sleikisneis at hugna sær við. Hon verður tvey ár í oktober.

Joan er uppvaksin í Klaksvík, men foreldrini eru av Húsum. Hon hevur saman við familju síni búð á Húsum í trý ár. Hetta dámar teimum sera væl.

– Tað hevur ómetaliga stóran týdning at hava handil her á oynni, tí so sleppa vit frá at bíleggja vørur úr Klaksvík. Men tað sum ikki er til keyps her, bíleggi eg úr Klaksvík, segði hon.

Joan er hvønn einasta dag í Geilabúðini, og um hon ikki skal keypa nakað, so fer hon altíð ein túr inn á gólvið fyri at fáa eitt prát við onnur fólk.

Á Kalsoynni búgva 150 fólk íalt. Fólk runt oynna eru ógvuliga glað fyri Geilabúðina. Øll av Húsum keypa har, umframt fólk aðrastaðni frá úr oynni.



*Her stendur Joan í Lon saman við dóttrini Oliviu*

*mynd: Jens Kr. Vang*